DADDAN 0-16 ÁR AXUMX
juice GIRL
fransa kids
ME TOO
minymo




Myndir: Jens Kristian Vang

# Klæðir til børn og ung

DADDAN ER EIN GOMUL OG KEND FYRITØKA Í HANDILSLÍVINUM Í HAVN. TEY FYRSTU NÓGVU ÁRINI Í LUCAS DEBESARGØTU OG SEINNI Á SMYRILSVEGI Á HÁLSI, SUM FØROYA STØRSTI HANDIL VIÐ BARNAKLÆÐUM

**Sp/f Daddan**

**Stjóri:**
Charlotte Ellendersen

**Adressa:**
Sp/f Daddan
Smyrilvegur 7
FO-100
Tórshavn
Tel. 312138

Magnus Gunnarsson

Føroya størsti og best kendi handil við barnaklæðum er uttan iva Daddan í Havn. Handilin húsast á 350 fermetrum á Smyrilsvegi 7 í Havn.

Daddan selur klæðir til børn upp í 16 ár. Handilin er býttur upp í sektiónir, soleiðis at lættari er hjá viðskiftafólki at finna tað, tey leita eftir. Tá handilin er so stórur, og úrvalið er hareftir, er sjálvandi eisini talan um nógv ymisk sløg og støddir av klæðum. Sektiónirnar eru




*Charlotte Ellendersen í Dadduni*

tríggjar í tali við klæðum til børn úr 0-2 ár, 2-8 ár og síðan til børn úr 8-16 ár. Deildin við klæðum til tey ungu eitur AxumX.

Handilin umboðar kend merkir sum t.d. Minymo, Fransa, Fixoni, Grunt, NexLevel og Juice.

Síðan vit yvirtóku handilin í 2006, hava vit broytt innbúgvið og gjørt handilin meira modernaðan og kundavinarligan, sigur Charlotte Ellendersen, sum er stjóri í Dadduni.

Vit leggja dent á at hava vørur í góðum kvaliteti til kappingarførar prísir og at veita kundum okkara eina góða tænastu. Tað vísir seg eisini, at vit hava nógv trúgv viðskiftafólk, sum vitja handilin og fylgja væl við tá vit t.d. fáa nýggjar vørur í handilin. Serliga síggja vit tað nú í heyst, og veturin nærkast, at stórur áhugi er fyri nýggjasta mótanum til børn og ung, sigur Charlotte Ellendersen.

*maggi@sosialurin.fo*



